# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

## HVÍ ERU SO NÓGV YMISK SLØG AV TARA AT FINNA Í KVÍVÍK.




Granskarar eru: Nomi, Naomi, Andras, Helena og Kira

# INNGANGUR

Vit í 4. til 6. hava arbeitt við ymiskum sum hevur við náttúruna at gera. Vit fóru í fýra bólkar har vit hava arbeitt við 4 ymiskum evnum. Okkara bólkur hevur arbeitt við tara.

Hyggur tú fram við sjóvarmálanum, sært tú tara nógvastaðni. Vit vóru niðri í fjøruni í Kvívík, har er ein rættiligur taraskógur. Vit vóru ikki greið yvir at tað var so nógvur tari har. Vit funnu nógvan tara, og tóku øll tey sløgini vit funnu niðan í skúlan hjá okkum, har vit fóru at granska sløgini nærri.

Lærarar:

Turið á Tórgarði turi.a.torgardi@skulin.fo & Malan Petersen malan.petersen@skulin.fo

Luttakarar:

Náttúra og tøkni, 4. – 6. flokkur. Í hesum bólkinum eru:

Nomi, Kira, Helena, Naomi og Andras.

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

3. Leggið eina ætlan

4. Savnið upplýsingar

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sigið øðrum frá

Fylgiskjøl

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Hví eru so nógv ymisk sløg av tara at finna í Kvívík?

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Fyri at finna útav, hví so nógvur ymiskur tari er at finna í Kvívík, hava vit gjørt nakrar hypotesur, sum vit fara at kanna nærri, og vita um tær passa ella ikki?

1. Tað er litevnið, sum er í  taranum, sum ger, at hann er ymiskur.
2. Tað ikki er nógvur ymiskur tari í Kvívík.

# 3. LEGGIÐ EINA ÆTLAN

- Vit gera eitt hugarok.
- Síðani ætla vit at fara vit oman í fjøruna at vita, hvat vit finna.
- Vit ætla at gera eitt Eyðmerkingarblað.
- Síðani fara vit at lesa í bókum, og á netinum.
- Vit fara at tosa við tara serfrøðingin *Luisa Düsedau*, umvegis Teams.
- Síðani fara vit at skráseta øll tarasløgini vit hava funnið.
- Og so fara vit at skriva uppgávuna.

# 4. SAVNIÐ UPPLÝSINGAR

Tá ætlanin er gjørd, mugu vit savna upplýsingar til hvørja hypotesu, og har hava vit funnið vitan av netinum og tosa við tara serfrøðing.

Vit hava millum annað vitan frá:

Luisa Düsedau[1]

Tarabóklingur[2] – 12 vanlig føroysk tarasløg

Gaia 5

Dýr og plantur í fjøruni

[1] týskur taraserfrøðingur, ið granskar í Arktis
[2] Agnes Mols Mortensen

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

1. Hypotesa 1

   Vit eru komin fram til, at tað sum ger, at so nógvur ymiskur tari veksur í Kvívík er, at tari hevur tørv á sól, og at tað er stórur munur á flóð og fjøru í Kvívík. Tí vaksa ymisk sløg av tara her.

2. Hypotesa 2

   Vit eru komin fram til, at tað eru sera nógv ymisk sløg av tara í Kvívík. Vit hava funnið 15 ymisk sløg. Vit megnaðu at eyðmerkja 14 sløg, men hava enn ikki eyðmerkt tann 15.

Tari er ein alguplanta, og brúkar fotosyntesu á sama hátt sum planturnar á landi.

Tarin hevur brúk fyri ljósi, men niðarliga í sjónum er einki ljós. Tí veksur tari bara framvið sjóvarmálanum, og á grunnum vatni. Tað kann vera baldrut fram við sjóvarmálanum, aldurnar eru ongantíð í frið og nógvastaðni er brim. Soleiðis er eisini í Kvívík, serliga um veturin. Í Kvívík er oftani sera stórur munur á flóð og fjøru og taravøksturin má tola bæði at liggja undir vatni í fleiri tímar, og at liggja turrur í fleiri tímar.

Vit eru komin fram til, at tey sløgini av tara, sum vaksa ovarlaga í fjøruni, hava oftani ein sterkari lit enn tann, sum veksur niðarliga í sjónum. Tarin sum veksur ovarlaga fær eisini meiri sól enn tann, sum veksur niðarliga.

Tann tarin sum veksur niðarliga í sjógvinum, er oftani myrkur á at líta, eitt nú brúnur.

Eisini hava vit funnið útav, at tari er góður at taða við og er somuleiðis góð føði hjá húsdjórum.

Eisini eru fólk í øðrum londum, sum eta tara sum grønmeti. Og um okkara leið nýta vit eisini tara meiri og meiri sum fólkaføði.

# 6. SIGIÐ ØÐRUM FRÁ

Við at senda tað inn til vitanarfróðu og siga øðrum frá. 😊 😊

# FYLGISKJØL

Eyðmerkingarblað til tara.

# Eyðmerkingarblað

Bygd bý: ____________

Hvar: ____________

Navn: ____________

Hvat finni eg?

| | Mynd | Hvar í fjøruni fann eg hetta? | Vitan |
|---|---|---|---|
| **Vørutari** *(Mastocarpus stellatus)* |  | | Vørutari kann blíva upp til 15cm langur |
| **Tonglatari** *(Laminaria hyperborea)* |  | | Tonglatari kann blíva yvir 2 metrar høgur |
| **Marbendil** *(Corda filum)* |  | | Marbendil kann blíva 8 metrar langur |
| **Bólatari** *(Ascophyllum nodosum)* |  | | Bólatari er 0,5-1,5 metrar langur og hevur luftbløðrur. |
| **Brúntari** *(Alaria esculenta)* |  | | Blívur í mesta lagi 2 metrar langur |
| **Snúgvin skúvtari** *(Fucus spiralis)* |  | | Snúgvin skútari kann blíva uml 5-30 cm langur |
| **Tang** *(Alaria esculenta)* |  | | Tang kann blíva 1-3 metrar langur |

# Eyðmerkingar-blað

Bygd/bý: ____________

Hvar: ____________

Navn: ____________

| Hvat finni eg? | Mynd | Hvar í fjøruni fann eg hetta? | Vitan |
|---|---|---|---|
| **Grøntari** |  | | Grøntari kann blíva 1-2 ár |
| **Reyðtari - Søl**<br>*(Palmaria palmata)* |  | | Umleið 10-50 cm |
| **Slýblað**<br>*(Ulva lactuca)* |  | | Slýblað kann veksa uml 5-30 metrar lengt. |
| **Tarablað**<br>*(Laminaria digitata)* |  | | Tarablað er ein av okkara størstu tarum. Hann kann blíva uml. 1-5 metrar. |
| **Sukurtari**<br>(*Laminaria saccharina*) |  | | Sukurtari veksur 4-5 Og kann vera 0,5 metrar breiður. |
| | | | |
| | | | |